# Skelkandi gongd í syðru helvt í Suðuroy

**Í ár hava virkini í syðru helvt í Suðuroy heili 80% minni lønarútreiðslu til arbeiðsfólk, enn tey gjørdu í 2002**



*Á havnarlagnum í Vági er aftur at steindeytt og at kalla øll virkini liggja still. Verða tiltøk ikki sett í verk beinanvegin, er syðra helvt í Suðuroy á veg í eina kreppu, sum kanska verður djúpari enn tann í nítiárunum*

KREPPA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Syðra helvt í Suðuroy er í kreppu. Svárari kreppu. Tað er tað ongin ivi um.

Rói Hjelm, formaður í vinnuráðnum í Suðuroyar syðru helvt, sigur, at hetta økið í landinum ekur á knøunum.

Aftur nú!

– Støðan í syðru helvt í Suðuroynni er so álvarslig, at tiltøk mugu setast í verk beinanvegin fyri at bjarga økinum, sigur hann.

Í útvarpinum í farnu viku, var samrøða við tveir búskaparfrøðingur. Annar rópti varskó um eina djúpa kreppu. Hin slættaði sjógvin og segði, at talan var bara um sveiggj í búskapinum og at ongin kreppa var á veg.

Formaðurin í Vinnuráðnum í Suðuroyar Syðru helvt, er ikki treytaleyst samdur við tí seinna búskaparfrøðingin.

– Tað kann vera, at tað ikki sær so galið út í Føroyum sum heild. Men tað ber ikki til at meta allar Føroyar undir einum. Tað ber ikki so frægt sum til at meta alla Suðuroynna undir einum.

– Og verða Føroyar tiknar øki fyri øki, er rættiliga stórur munur á, hvussu støðan er. Og tað skerst ikki burtur, at hóast tað eru færri enn 10 ár síðani tað stóru kreppuna, er longu aftur talan um sera djúpa kreppu í Suðuroyar syðru helvt, sigur Rói Hjelm.

Vinnuráðið í Suðuroyar Syðru helvt er júst í ferð við eina kanning um støðuna í Syðru helvt í Suðuroy. Hann hevur kannað arbeiðsloysið og hann hevur eisini kannað nøkur høvuðstøl fyri vinnulívið í økinum.

Og tað skerst ikki burtur, at úrslitið er sera dapurt.

– Ein sama slag kanning varð gjørd fyri einum ári síðani, men nú er støðan munandi versnað.

Rói Hjelm sigur, at nú er arbeiðsloysið í suðuroyar syðru komið heilt upp á 12,4%.

– Tá eru tey í fiskavirkisskipanini og tey, sum eru dottin úr ALS, ikki við.

Sostatt eru 192 fólk í syðru helvt skrásett at vera tøk á arbeiðsmarknaðinum. Til samanberingar kann nevnast, at í suðuroyar norðaru helvt, er arbeiðsloysið 4,3%.

Í Suðuroyar Norðaru helvt eru nøkur og sjeyti fólk arbeiðsleys.

Í øllum Føroyum er arbeiðsloysið 3,4% í miðal.

Sostatt er støðan í norðaru helvt í Suðuroy verri enn í landinum annars. Men í Syðru helvt í Suðuroy er hon so nóvar ferðir verri.

### 80% minni í lønum

Formaðurin í vinnuráðnum í Suðuroyar Syðru helvt hevur eisini kannað, hvussu nógv tey ymsu stóru framleiðsluvirkini í økinum hava goldið í lønum.

Hann hevur spurt virki fyri virki um, hvussu stórar útreiðslurnar til lønir vóru fyrsta ársjfórðing í ár og so hevur hann framskrivað tølini fyri alt árið.

– Úrslitið er rætt og slætt skelkandi. Heldur hendan støðan fram, tað, sum er eftir av árinum, verða útreiðslurnar til lønir heili 80% (áttati prosent), minni enn tær vóru í 2002.

– Sostatt hava tey stóru framleiðsluvirkini í Syðru helvt í Suðuroy eina afturgongd uppá skakandi 80% ímeðan landið annars hevur eina framgongd.

Samstundis skal havast í huga, at tá eru tímalønirnar enntá hækkaðar eini 9%.

Hann sigur, at hesa seinastu tíðuna eru fleiri av framleiðsluvirkjunum afturlatin.

Hann nevnir alingina sum dømi.

– Í 2002 vóru 220 heilársverk í alivinnuni.

– Nú eru 13 ársverk eftir! Rói Hjelm sigur, at enn er støðan í Vági ikki heilt so ring, sum hon var í kreppuni í nítiárunum.

– Nú hava vit, hóast alt, Als, sum loftar teimum, sum missa arbeiðið. Hinvegin er onki at taka seg aftur í, at verður ikki okkurt gjørt beinanvegin, kann støðan skjótt gerast enn verri enn hon var í nítiárunum, tí tá vóru hóast alt fleiri skip á fjørðinum, enn tað eru nú og tá komu eisini tey smáu fiskavirkini í Vági, og tá var eisini alivinnan í Suðuroy.

Men nú eru at kalla øll fiskavirkini hildin uppat aftur og alivinnan liggur mestsum still, í hvussu so er eina tíð afturat.

### Kreppufundur í Vági

Rói Hjelm sigur, at tá ið kanningin er liðug, er ætlanin at skipa fyri kreppufundi í Vági.

Har er ætlanin at fáa politikarar av ymsum slagi suður at umrøða støðuna.

– Tað er greitt, at hóast framtøkini skulu fostrast í økinum, er syðra helvt í Suðuroy nú so niðurundirkomin, at tað má eisini ein politisk loysn, so gongd aftur kann setast á ein framburð.

Tað merkir, at tað slepst ikki undan onkrum, serligum politiskum stuðuli fyri at fáa syðru helvt í suðuroyar syðru helvt uppundan aftur.

Rói Hjelm sigur, at tá fer vinnuráðið eisini at leggja nøkur uppskot fram, fyri, hvussu syðra helvt í Suðuroy kann fáast á føtur aftur.

Hann vil ikki nevna nøkur ítøkilig uppskot enn.

Men tað er sannlíkt, at hugskotið um at stovna ein Suðuroyargrunn at stuðla vinnuligum tiltøkum, fer at verða sett framaftur.

– Í valstríðnum haldi eg at tað bara vóru umboðini fyri tjóðveldisflokkin, sum ikki lovaðu at seta ein suðuroyargrunn á stovn. Allir hinir flokkarnir beinleiðis lovaðu veljarunum í Suðuroy, at ein slíkur grunnur skuldi setast á stovn fyri at sparka lív aftur í Suðuroynna.

Hann sigur, at fólk í syðru helvt í Suðuroy hava ymisk hugskot um vinnulig tiltøk, sum kunnu setast í verk.

– Men tað, sum trot er á í stórum, tað er vágafúsum pengum.

Rói Hjelm minnir eisini á, at tá ið samgongan varð skipað, kunngjørdu politikarar úr samgonguni, at ein skjótt arbeiðandi bólkur skuldi setast beinanvegin, at gera uppskot um, hvørji tiltøk kundi setast í verk fyri at fáa Suðuroynna á føtur aftur.

Í hesum bólkinum skuldi eitt umboð vera fyri hvønn av teimum trimum samgonguflokkunum, javnaðarflokkinum, sambandsflokkinum og fólkaflokkinum.

Men hann sigur, at enn hava teir onki hoyrt aftur til hendan bólkin.

– Enn hevur vinnulívið í syðru helvt í Suðuroy so als onki hoyrt til hendan bólkin, sigur Rói Hjelm.

Í vinnuráðnum fyri syðru helvt í Suðuroy eru Rói Hjelm, formaður, Helgi Christiansen er næstformaður, Alex Vilhelm er kassameistari, Marita Vestergaard er skrivari og Arni Brattaberg og Ebba Vágsheim eru nevndarlimir.



# Berlingarin leyg um Oskarsson

**– Bæði í Danmark og í Føroyum er talan um stórar og grundleggjandi misskiljingar, og tað er orsøkin til rokið og kæruna hjá Óla Jacobsen, sigur formaðurin í Búskaparráðnum, Hermann Oskarsson. Mikumorgunin helt hann sama umstrídda fyrilesturin í Tinganesi, sum hann helt á Christiansborg. Ikki eitt orð varð sagt um ein skaðiligan blokk ella skattafrádráttin hjá fiskimonnum**



*– Mín fyrilestur sigur ikki eitt orð um skattalættan hjá fiskimonnum ella nakran skaðiligan blokk, og eg havi onga samrøðu havt við Berlingske Tidende, sum hevur lagt mær orð í munnin, sigur formaðurin í Búskaparráðnum, Hermann Oskarsson. Mikumorgunin helt hann umstrídda fyrilesturin í Tinganesi, sum ikki varð so kontroversiellur kortini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

OSKARSSON

*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Klokkan 11 mikumorgunin helt Hermann Oskarsson sama umstrídda fyrilesturin fyri løgmanni og øðrum áhugaðum í Tinganesi, sum hann helt á nógv umtalaðu ráðstevnuni á Christiansborg herfyri.

Formaðurin í Búskaparráðnum tók sjálvur stig til fundin, og endamálið hevur helst verið at beina burtur allar tær grovu misskiljingar, sum sambært honum hava verið eftir ráðstevnuna.

Í stuttum var vinnupolitiski fyrilesturin um, hvussu vit á skilabestan hátt reka okkara vinnupolitikk, og hvat vit eiga at nýta blokkin til og ikki. Ikki eitt orð varð sagt um skattafrádráttin hjá fiskimonnum, sum hevur fingið formannin í Fiskimannafelagnum at kæra Hermann Oskarsson, og heldur ikki varð nakað sagt um, at blokkurin er skaðiligur.

Sostatt tykist kæran hjá formanninum í Fiskimannafelagnum, Óla Jacobsen, at byggja á eina grundleggjandi misskiljing.

### Misskiljingar

*Men sambært Berlingske Tidende sigur tú, at ríkisveitingin er ein støðug hóttan at yvirhita búskapin og síðani at elva til kreppu, eins og tú finst at skattafrádráttinum hjá fiskimonnum?*

– Hatta havi eg ongantíð sagt í mínum fyrilestri. Eg havi ikki havt nakra samrøðu við Berlingske Tidende, og greinin hjá teimum er bert bygd á mín fyrilestur. Blaðmaðurin hevur sostatt lagt mær orð í munnin, sigur formaðurin í Búskaparráðnum, Hermann Oskarsson. Leiðslan á danska tíðindablaðnum hevur sambært Hermanni enntá viðgingið, at hann er skeivt siteraður, og tí gav greinin í Berlingaranum eina grundleggjandi skeiva fatan av boðskapinum hjá Hermanni.

– Bæði í Danmark og í Føroyum er talan um stórar og grundleggjandi misskiljingar, og tað er orsøkin til alt rokið og kæruna, slær Hermann Oskarsson fast. Hann sigur, at essensurin í fyrilestri hansara er at vísa á, hvussu tað almenna eigur at nýta sín pening, og har er blokkurin íroknaður í viðgerðini hjá Hermanni, sum als ikki nevnir nakað um, at hann er skaðiligur.

Hermann segði við byrjan á tíðindafundinum mikumorgunin, at hann vónaði ikki, at áhoyrararnir gjørdust vónbrotnir, tí fyrilesturin hevur als ikki uppiborið tað uppmerksemi og umtalu, hann hevur fingið.

### Einki nýtt

Hermann Oskarsson sigur, at øll sjónarmiðini í fyrilestrinum eru meiri ella minni gomul sjónarmið, sum hann fleiri ferðir fyrr hevur sagt, og sum eisini eru at finna á heimasíðuni hjá búskaparráðnum.

– At eg skal hava slatrað fyri dønum, er púra burturvið, og danski blaðmaðurin á Berlingaranum hevur helst funnið sjónarmið okkara um sjómansfrádráttin á heimasíðuni hjá okkum, sigur Hermann Oskarsson. Hann slær fast, at hann er harðliga ímóti skattalættanum til fiskimenn, men hetta eru gomul tíðindi, sum als ikki varð grett orð um í fyrilestri hansara.

– Tí er kæran frá Óla Jacobsen eins og alt annað ein misskiljing, slær Hermann Oskarsson fast, sum mikumorgunin frá 11 til 12 helt nógv umrødda fyrilesturin í Tinganesi, sum ikki var so kontroversiellur kortini. Bert løgið, at bara løgmaður av allari manningini í Tinganesi var til staðar til fyrilesturin, sum hevur fingið so nógva umtalu.

# Hermann má tola atfinningarnar

**– Eg eri sjálvur viðhaldsmaður av einum fríum orðaskifti, men fría orðaskiftið gongur báðar vegir. Ert tú sinnaður at úttala teg, mást eisini tola, at onkur finst at tær, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, um mongu ákoyringarnar, ið Hermann Oskarsson fær í hesum døgum**



*Jóannes Eidesgaard, løgmaður, var millum áhoyrararnar í Tinganesi mikumorgunin, tá Herman Oskarsson helt fyrilestur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

FYRILESTUR

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í Degi og viku í gjár fann stjórin í Føroya Banka, Jørn Astrup Hansen, hvassliga at teimum atfinningunum, ið hava verið ímóti formanninum í Búskaparráðnum, Hermann Oskarsson, seinastu dagarnar. Jørn Astrup Hansen helt atfinningarnar vera burturvið, og metti tað er stak óheppið, at Hermann fær slíka viðferð, tí hann er ein av fáu serfrøðingunum, ið veruliga torir at taka lut í føroyska samfelagskjakinum.

Vit spurdu løgmann, Jóannes Eidesgaard, hvat hann helt um mongu ákoyringarnar, ið Hermann Oskarsson hevur verið fyri seinastu dagarnar.

– Eg eri sjálvur viðhaldsmaður av einum fríum orðaskifti, men fría orðaskiftið gongur báðar vegir. Ert tú sinnaður at úttala teg, mást eisini tola, at onkur finnist at tær, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

### Kunnandi fyrilestur

Mikumorgunin fingu løgmaður og landsstýrið loksins møguleika fyri at hoyra nógv umrødda fyrilesturin hjá formanninum í Búskaparráðnum, Hermann Oskarsson, sum hann helt á stevnunum um blokkin hjá Norðuratlantsbólkinum á Christiansborg í farnu viku.

– Framløgan er nógv merkt av, at tað er ein búskaparfrøðingur, sum greiðir frá. Hann sær búskapin eitt sindur øðrvísi, enn vit politikkarar eru vanir við. Viðgerðin hjá Hermanni fór heilt aftur í 60 árini og fram til dagin í dag. Vit hugsa vanliga bert í einum fíggjarári, so fyrilesturin var avgjørt áhugaverdur, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Tað var Hermann Oskarsson sjálvur, ið heitti á landsstýrið um at sleppa halda nógv umrødda fyrilesturin fyri teimum.

– Fundurin var rættiliga kunnandi, og hann peikaði á fleiri økið, sum avgjørt kunnu vera eitt íkast til vinnupolitiska kjakið, sigur løgmaður at enda.